# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Eg hopaði bara, at eg skoraði*

*Fróði Clementsen, AB*



*Tvøråbáturin var bert stavnin frammanfyri Sundabátin í kappingini hjá 6-mannaførum við monnum á Sundalagsstevnuni. Hetta var tó nokk til at vinna, og sostatt var fyrsti sigurin í 16 ár hjá Tvøråbátinum veruleiki.*

# Fyrsti sigurin í 16 ár

**Fyri fyrstu ferð í 16 ár megnaði Tvøråbáturin at enda ovast á sigursskamlinum, tá teir vunnu róðurin hjá 6-mannaførum við monnum á Sundalagsstevnu**

KAPPRÓÐUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Tvøråbáturin kann ikki metast at vera millum mest vinnandi bátarnar í kappróðri seinastu árini. Undan Sundalagsstevnuni um vikuskiftið hevði Tvøråbáturin ongan róður vunnið síðani á Vestanstevnu í 1991. Tí kom tað helst óvart á fleiri, at báturin av Tvøroyri megnaði at vinna róðurin hjá 6-mannaførum við monnum á Sundalagsstevnuni leygardagin. Her sendi Tvøråbáturin Sundabátin og Stráluna niður á ávikavist annað og triðja plássið, og sostatt var fyrsti sigurin í 16 ár veruleiki.

Tað hevur annars ikki gingið nakað serliga væl hjá Froðbiar Sóknar Róðrarfelag seinnu árini. Hóast teir hava seks bátar í felagnum, so hevur verið langt ímillum góða løturnar á ovastu rók. Okkurt árið hava gentumanningarnar fingið góð úrslit, men hjá monnunum hevur gingið striltið.

Leygardagin var tó ein glotti at hóma hjá monnunum, og í hesum sambandi hevur Sosialurin tikið eitt prát við formannin í Froðbiar Sóknar Róðrarfelag, Marner Lisberg.

### Hava vant hart

Gleðin umborð á Smyrli ávegis til Tvøroyrar leygarkvøldið var stór. Tvøråbáturin hevði júst vunnið sín fyrsta róður í 16 ár, og á keiøkinum á Krambatanga var nógv fólk komið saman fyri at fagna manningini á bátinum. Hetta var ein stór løtu hjá Róðrarfelagnum, men hetta kom tó ikki heilt óvart á formannin í felagnum, Marner Lisberg.

- Teir hava vant hart líka síðani januar mánað, og manningin er sera góð. Fólk hava eisini fylgt væl við teimum í venjingunum, og tað hevur verið týðiligt, at áhugaði á Tvøroyri hava havt vónir til hesa manningina. Eg vil ikki beinleiðis siga, at eg hevði væntað ein sigur til Tvøråbátin í ár, men vónirnar hava alla tíðina verið góðar.

Gleðin var eisini stór á Tvøroyri, tá tað gjørdist greitt, at Tvøråbáturin fekk ein sigur í hús á Sundalagsstevnu.

- Fólk vóru ómetaliga glað fyri henda sigurin. Fleiri høvdu jú vónað hetta, men eg ivist í, um nakar tordi at vænta tað. Nú er fyrsti sigurin so komin í hús, og vónandi verður ikki so langt til tann næsta, sigur Marner.

### Stóran týdning fyri felagið

Marner Lisberg er heldur ikki í iva um stóra týdningin, sum hesin sigurin kann hava fyri kappróðrarfelagið.

- Nú hevur felagið verið í einum aldudali í nøkur ár, og tí hevur ein slíkur sigur ótrúliga nógv at siga. Áhugin bleiv nógv størri her suðri eftir triðja plássi, sum báturin fekk á Norðoyastevnu, so nú verður áhugin ivaleyst uppaftur størri eftir sigurin leygardagin. Tað er eisini týdningarmikið, at onkur vísir leiðina í einum felag, og tað er júst hetta, sum manningin umborð á Tvøråbátinum hevur gjørt.

Marner sigur at enda, at hesin sigurin hevur økt um vónirnar hjá bæði tvøráfólki og hjá manningini umborð á Tvøråbátinum.

- Ja, hetta hevur rættiliga økt um vónirnar hjá øllum her suðri. Nú hevur Tvøråbáturin fingið tvey góð úrslit í ár, so tað er eingin ivi um, at vit fara eftir meistaraheitinum. Tað verður sjálvandi ikki lætt, tí har eru fleiri góðar manningar, men vit hava góðar vónir.

Sosialin

## Reyes skeyt gullið heim

**Real Madrid tryggjaði sær spanska meistaraheitið sunnukvøldið, men tað leikaði leingi hart á hjá stjørnunum úr spanska høvuðsstaðnum**

FÓTBÓLTUR
*Pætur Albinus*
*patur@sosialurin.fo*

Undan seinasta umfarinum í bestu sponsku fótbóltsdeildini leygarkvøldið var alt púra opið í oddinum. Real Madrid og Barcelona lógu jøvn í stigum á fyrsta plássið, meðan Sevilla á triðja plássi eisini hevði møguleika at vinna meistaraheitið, um bæði Real Madrid og Barcelona snávaðu.

Real Madrid var tó favorittur at vinna meistaraheitið, tí ein sigur til spanska kongafelagið í seinasta dystinum á heimavølli ímóti Mallorca tryggjaði teimum meistaraheitið.

Tað leikaði tó hart á hjá Real Madrid, tí dysturin var bert 17 minuttir gamal, tá Varela legði gestirnar á odda. Henda støðan helt sær líka til hálvleiks, og samstundis sum Real Madrid var aftanfyri, førdi Barcelona heili 3-0 ímóti Gimnastic. So nú var meistaraheitið í Barcelona.

Í seinna hálvleiki gekk eisini leingi striltið hjá Real Madrid, men tá 65 minuttir vóru farnir, valdi venjarin, Fabio Capello at seta José Antonio Reyes inn, og hetta gav úrslit. Reyes var ikki meir enn komin á vøllin, tá hann javnaði til 1-1.

10 minuttir fyri leiklok legði Mahamadou Diarra Real Madrid á odda 2-1, tá hann var hægstureftir hornaspark, og so var Real Madrid á meistarakós.

Tríggjar minuttir seinni bleiv dysturin avgjørdur, tá Reyes sendi eitt langskot í netið. 3-1 gjørdist endaliga úrslitið í Madrid, og Real Madrid tryggjaði sær meistaraheitið.